†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum
at kæri bróðir mín

**Oskar Jacobsen**
vanliga nevndur Oskar í Smæruni

andaðist á Landssjúkrahúsinum
leygardagin 25. mai, 73 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin 29. mai 2002 kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Gudny**

Tey, ið vilja minnast Oskar kunnu lata eina gávu
til Spastikarafelagið – konto í Føroya Sparikassa.

# Tøkk

Teimum, sum við jarðarferðina og á annan hátt
mintust og ærdu kæru fastir, mostir,
abbasystir, ommusystir, langabbasystir,
langommusystir og oldurabbasystir

**Ingibjørg Mørkøre**

takka vit hjartaliga.

Eisini takka vit starvsfólki, búfólki og teimum
sum vitjaðu fyri tíðina á ellisheiminum í Havn.

*Familjunnar vegna*
**Tóroddur Kallsoy, Elinborg Thomsen**
**og Jógvan Mørkøre**

# Skemtiligur fótbóltsdystur í Klaksvík

**Aftur í ár skipar Lions Club Klaksvík fyri einum skemtiligum fótbóltsdysti í sambandi við Norðoyastevnuna**

SKEMT
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Tann skemtiligi fótbóltsdysturin, sum Lion Club Klaksvík skipar fyri, er vorðin eitt afturvendandi tiltak í sambandi við Norðoyastevnuna.

Og árið í ár verður einki undantak í so máta.

Í kvøld, týskvøld, klokkan 20.00 verður aftur dystur leiktur á vøllinum í Klaksvík.

Dysturin í ár verður millum Norðoya Røktarheim, Klaksvíkar Sjúkrahús og P/F Kósin.

Dómari verður kendi skemtarin Mogens Højsted.

Sum nakað nýtt verður í hálvleikinum ein togtogan millum áhoyrarnar á skránni.

Áðrenn dystin verður skipað fyri skrúðgongu, og byrjar hon í sjúkrahúsgarðinum klokkan 19.30.

Stórur áhugi plagar at verða fyri hesum tiltakinum, og somuleiðis verður uttan iva eisini í ár. Á henda hátt kunnu norðoyingar eins og tjóvstarta Norðoyastevnuna, sum jú byrjar komandi fríggjadag.

Kostnaðurin fyri vaksin er 20 krónur. Undir dystinum verða lutaseðlar seldir, og fer allur peningurin óskerdur inn til vælgerandi endamál.

# Listaframsýning á Sandoyar Kunningarstovu

LIST
*Tíðindaskriv*

Á Sandoyar Kunningarstovu er forvitnislig listaframsýning í summar.

Framsýningin lat upp í maimánaði og verður opin alt summarið.

Listafólkið, ið sýnir fram, er Súsan í Jákupsstovu, tóvirkislistakona á Sandi.

Súsan í Jákupsstovu er serliga kend fyri tóvirkislist, men á Kunningarstovuni er høvi at síggja vatnlitsmyndir,tekstilcollagur og stoffmálningar.

Framsýningin er opin frá mánadegi til fríggjadag kl. 9-11 fyrrapart og 14-16 seinnapart.





**Reykjavík**

Atlantic Airways flýgur teg beinleiðis til Reykjavíkar. Ein lítil, men livandi býur, sum er merktur av, at hann liggur miðskeiðis millum Amerika og evropeiska meginlandið.

**Prísur úr**
**2.700,-** (3 nætur
Íroknað er: flogferð fram/aftur, hotel og ferðaavgjald.

**Oslo**

Oslo er bæði margfullur og fullur av mótsetningum. Ein høvuðsstaður við altjóða dámi og kortini heilt ørðvísi enn aðrir høvuðsstaðir. Her er okkurt til okkum øll.

**Prísur úr**
**3.981,-** (3 nætur)
Íroknað er: flogferð fram/aftur, hotel og ferðaavgjald.

**London**

London er milliónabýurin, har ongum nýtist at keða seg. Býurin er eitt mentanarligt Mekka, víðagitin fyri síni leikhús, konserthøllir og vælumtóktu pubbirnar.

**Prísur úr**
**4.231,-** 4 nætur)
Íroknað er: flogferð fram/aftur, hotel og ferðaavgjald.

**Sí onnur góð tilboð í "Út í Heim"**
Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu
ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




Hevur tú lagt ábyrgdarfæið
um til partapening?

Vit hjálpa fegin við at fylla út
neyðugu skjølini.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo




# Keypti seyðahund fyri 14.500 krónur



*Teir tríggir ernu hundaeigararnir á flogvøllinum í Aberdeen, meðan teir bíða eftir at skriva seg inn til heimferðina heim til Føroya hóskvøldið. Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

SEYÐAHALD
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Aberdeen, Sosialurin:** Er áhugin nóg stórur, so spæla pengar ikki tann stóra leiklutin. Og er talan um ein góðan fullvandan seyðahund, so lvast Hanus Jóannesarson úr Vestmanna ikki, hann trívur í lumman og leggur nógvar túsundkrónuseðlar á borðið fyri ein slíkan. Í hesum førinum var talan um pund.

Tað vakti ans, tá tríggir undir manns komu á flogvøllin vesturi í Vágum annan hvítusunnudag við trimun avlongum og høgum kassum. Hol vóru í køssunum, sum vóru smíðaðir úr finer og hjól vóru undir. Nú er tað soleiðis, at ongin í allari almindiligheit við virðing fyri sær sjálvum, loyvir sær at spyrja onnur hvat tey hava í viðføri. Tað hoyrir líkasum privatlívinum til. Men tá undirritaði sá teir aftur á flogvøllinum í Aberdeen seinasta hóskvøld, so kundi eg ikki halda mær fyri berum forvitni og spurdi. Jú tríggir seyðahundar úr Bretlandi og eigararnir eru Hanus Jóannesarsson úr Vestmanna, Tummas Jacobsen, sonur Jákup Jacobsen, bónda úr Hvalvík og Hjalgrim á Heygum, sonur Heina bónda á Heygum.

Hanus Jóannesarson er í allari almindiligheit sjómaður og siglir úti hjá Maersk, men tá hann er heima hevur hann stóran áhuga í seyðahaldi og hann plagar at hjálpa Heina bónda á Heygum. Tá Hanus er burtur, so skal Heini taka sær av hundinum.

- Eg havi stóran áhuga fyri seyðahundum, ikki bara at nýta hesar til rakstur í haganum, men eisini at luttaka í hundakappingum. Tað er vorðin ein ítrótt í dag, sigur Hanus Jóannesarson, meðan vit standa í bíðirøð fyri at skriva okkum inn til flogferðina heim.

- Eg kom í samband við ein haldbónda, ein pensioneraðan bónda í syðra parti av landslutinum Yorkshire. Hetta hendi gjøgnum internetið. Bóndin eitur Jack Greenbank, er 73 ára gamal og býr í bygdini Salterforth. Bóndin hevur fingist við hundar í mong ár og hann venur enn bordercolliar til góðar rakstrarhundar. Vit gjørdu av at fara niður at vitja hann, og tað endaði við at vit keyptu tvær tíkar frá honum. Onnur eru tvey ár og onnur er trí og eitt hálvt ár. Báðar eru vanar at reka seyð. Ein annan seyðahund keyptu vit eystanfyri bygdina Sterling Castle. Vit gleða okkum at koma heim at royna hundarnar, sigur Hanus Jóannesarsson úr Vestmanna.

# Ein fitt barnagenta í Aberdeen



*Betty í Aberdeen saman við abbasoni Jørgen Thomsen, sála á Skála*

VINARLAG
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Myndin sýnir 70 ára gomlu Betty í Aberdeen við soninum hjá Sáru av Skála og Svonko Mrdalo úr Kroatia. Sára er dóttir Jørgen Thomsen, sála, íð var politikkari í mong ár.

Betty er sjálv fødd í Aberdeen í gomla fiskibýlinginum Footdee á norðaru síðu við innsiglingina til Aberdeen. Hon var fimm ára gomul fyrstu ferð hon hitti føroyingar í 1937. Pápi hennara seldi fisk og hann gjørdist vinur við Kaj Johannesen, skipara úr Hvannasundi, sum um hetta mundi sigldi niður at selja. Teir hittust á marknaðinum og funnu skjótt fram til, at teir høvdu annað tilfelags enn fisk. Kaj byrjaði at ganga á møti í salinum í Footdee saman við pápa Betty. Hann kom eisini í heim teirra saman við øðrum brøðrum, í orðsins rætta týdningi. Betty minnsit Kaj sum smágenta sum ein "a Gently Giant" ein vinarligan risa. Síðan hevur Betty havt nógv samband við føroyingar í Aberdeen. Fyri 25 árum síðan var hon í Føroyum og vitjaði millum annað Kaj og konuna og eisini Esmar Fuglø.

Betty og maðurin eiga húsini sum Sára og Svonko búgva í meðan Svonko lesir í Aberdeen, so Betty er landlady hjá teimum. Beint yvir av hesum húsum eigur Sofus Poulsen, umboðsmaður eini hús. Betty er ógvuliga góð við børn og hon plagar at fara í barnagarðin eftir hesum lítla føroyingi eisini og onkrar dagar fer hon til gongu í móti Sáru og soni.





GSM FRÍTÍÐ
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum